# Latið er upp fyri stríði um gullið



*Hvessingur hevur við sigrinum á Vestanstevnu, lagt upp til spennandi finalu um góðar tvær vikur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**6-MANNAFØR KVINNUR Nú er møguleiki fyri, at meistaraheitið fer at enda í Sundalagnum og ikki á Skálafjørðinum**

**Tróndur Arge**

Tað er vent upp og niður í kappingini millum 6-mannafør við kvinnum. Meðan Sølmundur var tryggur vinnari í fyrstu kappingunum, so er tað nú Hvessingur, sum er besti bátur.

Í góðveðrinum í Sørvági var eingin ivi, tá ið bátarnir komu fram ímóti málinum. Hvessingur var væl meiri enn eina bátslongd frammanfyri Sølmund.

Óvæntað var Gongurólvur leingi við at seta dám á kappingina, men í endaspurtinum var Sølmundur drúgvari í kappingini um næstfremsta plássið. Men Sølmundur megnaði als einki at gera við Hvessing.

Úrslitini fyrr í summar bera við sær, at Sølmundur framvegis er besta boðið upp á at vinna FM. Men úrslitini í Vestmanna og serliga í Sørvági benda á, at tað er møguleiki fyri, at FM heitið fer at enda í Hvalvík/Streymnesi og ikki á Skálafjørðinum, sum tað annars hevur verið lagt upp til størsta partin av kappingarárinum.

Tað eru meiri enn tvær vikur til Ólavsøku, og tað er harvið møguleiki fyri, at gongdin tá fer at verða øðrvísi, enn hon hevur verið seinastu vikurnar.

Í løtuni sær tað út til, at Hvessingur er stórfavorittur at vinna ólavsøkuróðurin. Og úrslitið í Sørvági kundi bent á, at tað kann gerast trupult hjá Sølmundi at vinna kappingina um næstfremsta plássið við Gongurólv, sum í kapping við Riddaran stríðist fyri at vinna bronsumerkini.

Tær á Sølmundi hava avgerðina í sínum hondum. Men um tær ikki taka av, og tað kiksar heilt, og tær enda á triðja plássi, og um Hvessingur vinnur, so verður Hvessingur meistari.

Sølmundur við kvinnumanning hevur ongantíð vunnið FM. Hvessingur hevur vunnið hesa kappingina tvær ferðir – í 1996 og 1998.

*trondur@sosialurin.fo*

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Hvessingur | 05:08.17 |
| 2 | Sølmundur | 05:12.17 |
| 3 | Gongurólvur | 05:13.10 |
| 4 | Riddarin | 05:14.24 |
| 5 | Jarnbardur | 05:36.14 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sølmundur | 40 |
| 2 | Hvessingur | 38 |
| 3 | Gongurólvur | 27 |
| 4 | Riddarin | 27 |
| 5 | Jarnbardur | 15 |



*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Stevna stavn um stavn móti Ólavsøkuni

**5-MANNAFØR DREINGIR Á Ólavsøku verður gysara finalu millum dreingjamanningarnar umborð á Royndini Fríðu úr Vági og Bliki av Argjum, sum hesa ferð var tryggur vinnari**

**Tróndur Arge**

Eftir seks kappróðrar ber tað ikki til at mynda betri fyritreytir fyri spennandi finalu enn henni, sum nú bíðar millum Royndina Fríðu úr Vági og Blik av Argjum við dreingjamanningum.

Í Sørvági var einki at rafla um. Eftir at Royndin Fríða hevði vunnið bæði í heimasjógvi á Jóansøku í Vági og aftur á Fjarðastevnu í Vestmanna, vóru tað teir av Argjum, sum so rudduliga settu dagsskránna í Sørvági.

Blikur togaði seg í fyrstu tøkunum eitt vet framum Royndina Fríðu, og Blikur var fremstur allan teinin. Fjarstøðan longdist eitt vet millum teir báðar fremstu, og á málinum var Blikur tað mesta av einari bátslongd frammanfyri.

Blikur hevur vunnið tríggjar ferðir, og Royndin Fríða hevur vunnið tríggjar ferðir. Blikur hevur tríggjar ferðir verið næstfremstur, og Royndin Fríða hevur tríggjar ferðir verið næstfremst. Tað stendur á jøvnum í stigum – 39 stig í part – og tann, sum verður fremri av hesum báðum á Ólavsøku verður meistari.

Kappingin um triðja plássið var leingi tøtt og spennandi. Firvaldur av Tvøroyri var drúgvastur, og á málinum var hann skutin frammanfyri Teistan, Jallin og Svan, sum vóru sera javnir. Junkarin og Havfrúgvin vóru aftastir.

*trondur@sosialurin.fo*

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Blikur | 05:01.18 |
| 2 | Royndin Fríða | 05:03.05 |
| 3 | Firvaldur | 05:07.04 |
| 4 | Teistin | 05:08.04 |
| 5 | Jallurin | 05:08.05 |
| 6 | Svanur | 05:08.22 |
| 7 | Junkarin | 05:14.02 |
| 8 | Havfrúgvin | 05:32.06 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Blikur | 39 |
| 2 | Royndin Fríða | 39 |
| 3 | Firvaldur | 24 |
| 4 | Svanur | 18 |
| 5 | Teistin | 18 |
| 6 | Jallurin | 18 |
| 7 | Sílið | 8 |
| 8 | Junkarin | 4 |